Almanna- og mentamálaráðið

Dagfesting:	8. feb. 2024
Mál nr.:	23/19640
Málsviðgjørt:	TVR/AJ
Ummælistíð:	28. nov. 2023- 11. des. 2023
Eftirkannað:	08.12.2023

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um kringvarp
(Árlig prístalsjavning, lægri kringvarpsgjald fyri smærri virki, stovnar o.fl., broyting í kringvarpsgjaldinum fyri likamligar persónar og aðrar smærri broytingar)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 91 frá 21. desember 2004 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010 og løgtingslóg nr. 163 frá 24. desember 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2, stk. 4, 2. pkt., § 4, stk. 1, § 4, stk. 2, nr. 3, § 4, stk. 3, 1. pkt., tvær staðni í § 4, stk. 6, § 8, stk. 8, 1. pkt., § 10, stk. 5, § 15, stk. 1 og 3, § 16, stk. 2, 4. pkt., tvær staðni í § 16, stk. 3, § 16, stk. 4 og § 19, stk. 5 verður "Landsstýrismaðurin" broytt til: "Landsstýrisfólkið".

2. Í § 4, stk. 2, nr. 1, § 5, stk. 2, § 11, stk. 2 og § 15, stk. 2 verður "landsstýrismaðurin" broytt til: "landsstýrisfólkið".

3. Í § 4, stk. 7, § 9, stk. 1 og 2 og § 16, stk. 1 verður "landsstýrismanninum" broytt til: "landsstýrisfólkinum".

4. § 7, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis: "Allir likamligir persónar í aldursbólkinum 24 ár og fram til aldurin sambært stk. 2, ið hava fulla skattskyldu sambært § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, hava skyldu at rinda kr. 163,00 um mánaðin í kringvarpsgjaldi, sbr. stk. 5-6. Skyldan at rinda kringvarpsgjald tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur er fyltur 24 ár. Undantiknir skylduni at rinda kringvarpsgjald sambært 1. pkt. eru persónar, sum vegna útbúgving fyribils hava tilhald uttan fyri Føroyar.

Stk. 2. Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært stk. 1 er kr. 63,00 um mánaðin fyri persónar, sum eru í fólkapensjónsaldri sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. Skyldan at rinda kringvarpsgjald sambært hesum stykki tekur við tann fyrsta mánaðin eftir, at persónur hevur rokkið tann í 1. pkt. nevnda aldur."

5. Í § 7, stk. 3, 1. pkt. verður "stk. 4-5" broytt til: "stk. 5 og 6".

6. Í § 7, stk. 3, nr. 5 verður "kr. 3.500,00," broytt til: "kr. 3.000,00,".

7. Í § 7, stk. 3, nr. 6 verður "kr. 2.000,00" broytt til: "kr. 1.500,00".

8. Í § 7 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 4.* Tann 1. januar á hvørjum ári verða gjaldsupphæddirnar sambært stk. 1 og stk. 2 prístalsjavnaðar við tveimum prosentum í mun til ta seinastu gjaldskyldugu upphæddina árið fyri. Árliga gjaldsupphæddin verður rundað til nærmasta heila krónutal."
Stk. 4 og 5 verða eftir hetta stk. 5 og 6.

9. Í § 11, stk. 1 verður "Landsstýrismanninum" broytt til: "Landsstýrisfólkinum".

10. Í § 23, 1. pkt. verður "landsstýrismannin" broytt til: "landsstýrisfólkið".

§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 4-7 koma í gildi mánaðin eftir, at løgtingslógin kemur í gildi.
Stk. 3. § 1, nr. 8 kemur í gildi tann 1. januar 2025.
Stk. 4. Øll krøv fyri kringvarpsgjald, ið stava frá tíðini, áðrenn henda løgtingslóg kemur í gildi, eru fevnd av áður galdandi reglum.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í samgonguskjalinum stendur, at miðlalandslagið og Kringvarp Føroya skulu styrkjast. Sum liður í hesum verður skotið upp at styrkja Kringvarp Føroya fíggjarliga við at hækka kringvarpsgjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka gjaldskyldugu upphæddina úr kr. 50,00 um mánaðin upp í kr. 63,00 kr. um mánaðin.

Skotið verður eisini upp at prístalsjavna kringvarpsgjaldið fyri likamligar persónar á hvørjum ári frá og við 2025 at rokna í mun til árið fyri.

Harumframt verður skotið upp, heldur enn at nevna ávísan ovara aldur, at áseta, at tað eru persónar í fólkapensjónsaldri, ið eru fevndir av lægra gjaldinum. Á tann hátt verður lagt upp fyri møguligum hækkingum í fólkapensjónsaldrinum, uttan at neyðugt er at broyta lógina hvørja ferð.

Skotið verður eisini upp at lækka kringvarpsgjaldið fyri smærri stovnar og virki, so at stovnar, virki og aðrir løgfrøðiligir persónar, hvørs árligu lønarútreiðslur liggja millum kr. 100.000,00 og kr. 499.999,99 ávikavist millum kr. 500.000,00 og kr. 999.999,99 fara at rinda 500 kr. minni um árið, t.e. at gjaldið lækkar úr ávikavist kr. 3.500,00 niður í kr. 3.000,00 og úr kr. 2.000,00 niður í kr. 1.500,00 um árið.

Kringvarpsgjaldið hevur staðið í stað í nógv ár. Gjaldið er ásett í kringvarpslógini, tí Kringvarpið fær ikki játtan á fíggjarlógini til rakstur, sum aðrir almennir stovnar fáa, og lýsingarinntøkurnar fara í landskassan. Orsøkin til, at Kringvarpið ikki fær játtan til rakstur á fíggjarlógini, er fyri at tryggja óheftni í mun til ta politisku skipanina. Skal kringvarpsgjaldið broytast, er tí neyðugt at broyta sjálva kringvarpslógina. Stórur prísvøkstur hevur verið seinastu árini. Tað er vorðið munandi dýrari hjá Kringvarpinum at keypa rættindi, eins og starvsfólkaútreiðslurnar eru vaksnar nógv, tí fleiri av starvsfólkunum í Kringvarpi Føroya eru vorðin fevnd av BA-stiganum hjá Starvsfelagnum. Hóast stóran fólkavøkstur seinastu árini er talið á fólki í fólkapensjónsaldri vorðið vaksandi. Tað hevur havt neiliga ávirkan á inntøkugrundarlagið hjá stovninum, tí fólkasamansetingin ger, at alsamt fleiri verða fevnd av lægra kringvarpsgjaldinum.

Kringvarp Føroya hevur seinastu árini tikið fleiri stig fyri at betra um raksturin á stovninum. Í november 2023 var ætlanin at spara á leið 11 ársverk burtur, men sum fylgja av hesum lógaruppskotinum er tann ætlanin fyribils slept. Ætlaðu sparingarnar høvdu harumframt merkt framleiðsluna/skránna á stovninum. T.d. hevur ætlanin verið at strika árligu Nýggjárskonsertina, Í luftini og finalur í flogbólti, svimjing og fimleiki. Ætlanin var eisini at strika Fiskivinnutingið, Torradagar, U-21 hondbólt, Geytan og aðrar sonevndar Open-Broadcast framleiðslur. Innan Aktuelt var ætlanin at strika tímapressuna í útvarpinum millum kl. 13.00 og 17.00, eins og ítrótturin hevði verið skerdur munandi. Innan Mentan var ætlanin at fara úr á leið 40 dokumentarum og niður í á leið 24. Eisini høvdu sendingar so sum Samværi, Vágskálin og Vikan verið strikaðar saman við tónleikasendingum. Tílíkar skerjingar høvdu eisini havt avleiddan virknað fyri sendingar til børn og ung. Við hesum uppskotinum verða ætlaðu uppsagnirnar sleptar, men væntast má tó, at sparingar fara serliga at verða gjørdar á tær størru sjónvarpsframleiðslurnar, tí stovninum fer framvegis at vanta á leið 3 mió. kr. fyri at fáa raksturin at hanga saman.

Um eingi átøk verða gjørd, og hetta uppskotið ikki verður samtykt, fer stovnurin í 2024 væntandi at hava eitt hall á umleið 8,5 mió. kr. Um verandi uppskot verður samtykt, kemur

stovnurin so við og við í fíggjarliga javnvág, hóast tað verður nakað av halli tey fyrstu árini, sbr. í hesum sambandi hoyringarskrivið frá Kringvarpi Føroya í fylgiskjali 2, sum við støði í hesum uppskotinum lýsir, hvat ein lækking í gjaldskylduga aldrinum hevði fört við sær av meirinntøkum:

23 ár: **7,1 mió. kr.**
22 ár: **8,2 mió. kr.**
18 ár: **14,1 mió. kr.**

1.2. Galdandi lóggáva
Í galdandi lóggávu er eingin prístalsjavning. Gjaldskylduga upphæddin í dag fyri persónar í aldursbólkinum 24-66 ár er kr. 150,00 um mánaðin, og fyri fólk yvir 66 ára aldur er kringvarpsgjaldið kr. 50,00 um mánaðin. Virki, stovnar og aðrir løgfrøðiligir persónar, hvørs árligu lønarútgjaldingar eru ímillum kr. 100.000,00 og kr. 499.999,99, rinda kr. 2.000,00 um árið í kringvarpsgjaldi. Løgfrøðiligir persónar, hvørs árligu lønarútgjaldingarnar eru millum kr. 500.000,00 og kr. 999.999,99, rinda kr. 3.500,00 í kringvarpsgjaldi um árið.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at bera so í bandi, at Kringvarpið so við og við kemur í fíggjarliga javnvág og at tryggja inntøkugrundarlagið móti árligum prísvøkstri. Eisini er eitt av endamálunum at lækka gjaldskyldugu upphæddina hjá smærri virkjum og stovnum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Skotið verður upp, at tað eru persónar í fólkapensjónsaldri, ið koma undir lægra gjaldið. Á tann hátt verður lagt upp fyri møguligum hækkingum í fólkapensjónsaldrinum, uttan at lógin skal broytast, um fólkapensjónsaldurin skuldi blivið hækkaður í framtíðini.

Skotið verður eisini upp at lækka kringvarpsgjaldið fyri smærri stovnar, virki og aðrar løgfrøðiligar persónar við kr. 500,00 um árið.

Hjá fólki undir fólkapensjónsaldur verður skotið upp at hækka gjaldið úr kr. 150,00 um mánaðin og upp í kr. 163,00 um mánaðin. Hjá fólki í fólkapensjónsaldri verður skotið upp at hækka gjaldskyldugu upphæddina úr kr. 50,00 og upp í kr. 63,00 um mánaðin.

Skotið verður eisini upp at prístalsjavna kringvarpsgjaldið fyri likamligar persónar á hvørjum ári frá og við 2025 at rokna í mun til árið fyri.

Hesi átøk fara væntandi at gera, at stovnurin so líðandi kemur í fíggjarliga javnvág og verður tryggjaður móti árliga prísvøkstrinum. Uppskotið hevur tann fyrimun, at Kringvarp Føroya sum einasti public service-miðil í Føroyum, verður styrktur fíggjarliga.

Um verandi uppskot verður samtykt, verður kringvarpsgjaldið tey komandi árini fyri fólk undir ávikavist yvir fólkapensjónsaldur sum lýst í tabellini niðanfyri. Fyrst verður gjaldið prístalsjavnað, og síðani rundað til nærmasta heila krónutal. Nærmasta heila krónutalið er tá grundarlagið fyri prístalsjavningini tað komandi árið. Um gjaldsskylduga upphæddin, áðrenn hon verður rundað, liggur mitt millum tvey heil krónutøl, verður rundað niðureftir:

	2024	2025	2026	2027	2028	2029	2030	2031	2032
Undir pensjónsaldur	163	166	169	172	175	178	182	186	190
Pensjónsaldur	63	64	65	66	67	68	69	70	71

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá hinum stjórnarráðunum, Kringvarpi Føroya, Akademikarafelagnum, Búskapar- og løgfrøðingafelagnum, Starvsfelagnum, Felagnum Føroysk Miðlafólk, TAKS, Vinnuhúsinum, Kommunufelagnum, Sosialinum, VP, Dimmalætting, Rás 2, JN, R7, Oyggjatíðindum, Norðlýsinum, Suðurrás, Sandportalinum, ting.fo og á almenna hoyringarportalinum.

Hini stjórnarráðini høvdu onga viðmerking til uppskotið.

Kringvarp Føroya mælir til, *at* prístalsjavningin skal fylgja gongdini í prís- og lønarstøðinum og eigur eisini at fevna um gjaldið frá stovnum, virkjum o.l.;

at ætlaða minkingin frá smærri virkjum, stovnum o.l. eigur at verða kompenserað við størri gjaldi frá teimum størru virkjunum og

at skyldan fyri at rinda kringvarpsgjald verður sett niður á 18 ár.

Almanna- og mentamálaráðið ætlar ikki, at nakað virki skal rinda meiri í kringvarpsgjaldi. Hildið verður ikki, at ein skattur eigur at fylgja gongdini í prís- og lønarstiganum, eins og galdandi er fyri veitingar til borgaran, har landsstýrisfólkið í kunngerð ásetir javningarprosentið fyri almennar veitingar. Í hesum føri er talan um ein skatt, sum ikki kann ásetast fyrisitingarliga, uttan so at útrokningargrundarlagið stendur greitt ásett í lógini, soleiðis at landsstýrisfólkið ikki hevur nakað rásarúm at áseta, broyta ella at strika skattin fyrisitingarliga. Eingin almennur stovnur við egnari játtan er heldur tryggjaður móti gongdini í prís- og lønarstiganum, hóast tað er lættari at gera tað umvegis fíggjarlógina enn umvegis kringvarpslógina. Orsøkin til galdandi skipan í Føroyum er at tryggja óheftni og armslongd, so at politiski myndugleikin ikki kann skrúva niður og upp á inntøkugrundarlagið hjá einum almennum public-service miðli, ið eitt nú hevur til endamáls at vera kritiskur mótvegis teimum ráðandi.

Føroysk Miðlafólk skriva í sínum hoyringarskrivi, at lógaruppskotið er lítið annað enn eitt neyðaregg vorpið eftir deadline. Í stóra perspektivinum broytir tað einki.

Tað ikki so frægt sum fyribyrgir aktuellu og akuttu støðuni, ið Kringvarpið er komið í. Føroysk Miðlafólk heita tí staðiliga á alla politisku skipanina um at taka støðuna í størri álvara enn higartil, og vísa hvørja grundleggjandi visjón hon hevur fyri almenna public service-stovninum, føroyskum journalistikki og føroyska miðlalandslagnum sum heild.

Almanna- og mentamálaráðið ásannar, at tað hevur verið gjørt ov lítið á økinum í fleiri ár, men verandi uppskot gevur stovninum eina meirinntøku í 2025 á smáar 5,5 mió. kr., og eina prístalsjavning frá og við 2025. Hækkingin í einum, tá ið lógin kemur í gildi, er væl hægri enn 2%, so tí kemur sjálvvirkna prístalsjavningin fyrst í gildi í 2025. Mett verður eisini, at stovnurin kann tillaga raksturin/framleiðsluna nakað, so at hallið í 2024 gerst minni ella kanska hvørvur. Prístalsjavningin fer síðani at gera, at stovnurin so líðandi kemur í fíggjarliga javnvág.

Tóri Restorff Jacobsen vísir á, at fólkasamansetingin komandi 20 árini fer at broytast, og fleiri gerast tí 67+.

Hann heldur tískil, at tað er ein løtuvinningur at hækka gjaldið hjá teimum yngri enn 67, tí tey fara lutfalsliga at gerast færri.

Eisini verður víst á, at tað er ein andsøgn, at fleiri av teimum best løntu her á landi (borgarstjórar, løgtingsfólk og rokskiparar, musikkskúlastjórar) skulu rinda 50/63kr mánaðarliga, tí tey eru 67+, meðan ung fólk skulu rinda 3 ferðir so nógv.

Mælt verður til, at pensjonistar, sum arbeiða, rinda fult gjald.

Almanna- og mentamálaráðið fer ikki at ganga ynskinum á møti at javnseta øll arbeiðandi í mun til kringvarpsgjaldið, tí mett verður ikki, at fólk yvir fólkapensjónsaldur eru eins virkin á arbeiðsmarknaðinum samanborið við fólk undir fólkapensjónsaldur. Eisini verður tað umsitingarliga tungt at fylgja við, hvør arbeiðir og ikki, og hvussu nógv, ið viðkomandi yvir fólkapensjónsaldur skal arbeiða, áðrenn talan gerst um fult kringvarpsgjald.

Vinnuhúsið vísir á, at Føroyar víkja grundleggjandi frá sínum grannalondum, tá ið hugt verður at fyritøkum og kringvarpsgjaldi. Í Danmark, Noregi og Svøríki rinda fyritøkur als ikki kringvarpsgjald. Síðani hesi lond fyri nøkrum árum síðani umskipaðu kringvarpsgjaldið til at verða fíggjað umvegis skattin, hava fyritøkur ikki rindað kringvarpsgjald. Í Íslandi rinda fyritøkurnar eitt munandi minni gjald, enn fyritøkurnar í Føroyum gera. Tær rinda umleið 1.000 krónur um árið. Ætlaðu broytingarnar hjá landsstýrinum leggja upp til at lækka kringvarpsgjaldið fyri tær smæstu fyritøkurnar. Ítøkiliga er ætlanin, at tær fyritøkurnar, ið hava undir eina millión krónur í lønarútreiðslum um árið, fáa ein lætta á 500 krónur um árið. Hetta er ein bati.

Almanna- og mentamálaráðið kann bara staðfesta, at skipanirnar eru ymiskar frá landi til land. Áðrenn galdandi lóg kom í gildi, rindaðu virki tað sama sum persónar. Men fyri at lætta um hjá fólkapensjónistum og ungum, samstundis sum lýsingarinntøkurnar fóru í landskassan til tess at tryggja Kringvarpinum enn størri óheftni í mun til handilslig áhugamál, varð farið eftir at krevja virkjum, stovnum o.ø. hægri gjald, ið var grundað á lønarútgjaldingarnar árið fyri innkrevjingarárið. Nú verður so skotið upp at lætta um hjá smærri virkjum o.ø. løgfrøðiligum persónum.

Knassar vilja avtaka miðlastuðulin og ikki loyva Kringvarpinum at selja lýsingar og sponsoravtalur.

Almanna- og mentamálaráðið heldur ikki, at lógaruppskotið hevur nakað við miðlastuðulin, sponsorering ella lýsingarinntøkur at gera. Upplýsast kann tó, at allar lýsingarinntøkur hjá Kringvarpinum fara í landskassan.

TAKS mælir til ymiskar umsitingarligar broytingar í lógini, eitt nú tí tað er torført hjá TAKS at definera, hvat er ein almennur stovnur.

Almanna- og mentamálaráðið heldur, at mongu umsitingarligu uppskotini frá TAKS til broytingar í kringvarpslógini snúgva seg um onnur viðurskifti enn tey, ið hetta uppskotið snýr seg um. Eisini eru broytingarnar ov umfatandi at seta verk við so stuttum skotbrái, tá ið júst hetta lógaruppskotið hevur stóran skund at fáa lagt fyri Løgtingið. Ráðið heldur tó, at partarnir í felag áttu at mett um lógina fyri at kanna, hvørjir umsitingarligir batar kunnu gerast.

Annars kann ráðið vísa til álit frá Løgtingsins Mentanarnevnd til ta seinastu lógarbroytingina í løgtingsmáli 26/2015, har tað stendur á bls. 3:

"Skotið verður upp, at broyta orðingina "interkommunalir stovnar" til "interkommunalir felagsskapir", sum helst er eitt rættari hugtak at nýta um eitt nú SEV og IRF. Harumframt verður hugtakið "interkommunalir felagsskapir" brúkt í fyrisitingarlógini. Skotið verður eisini upp, at orðingin "kommunur" verður broytt til "kommunalir stovnar", hóast ein kommuna er ein myndugleiki í fyrisitingarrættarligum høpi, sbr. meginregluna um kommunalu eindarfyrisitingina. Hóast galdandi lóg ikki tekur dagar millum slag av stovnum, er nýggja orðingin mett at vera greiðari og í samsvari við longu galdandi siðvenju á kommunala økinum, nú dagstovnar, eldraheim, skúlar o.l. arbeiðspláss í einari kommunu eru at meta sum sjálvstøðugt gjaldskyldugir stovnar í mun til kringvarpsgjaldið. Broytingin hevur onga broyting við sær í mun til støðuna í dag."'

Sostatt hava allir almennir stovnar – eisini teir, sum ikki neyvt eru myndugleikar – gjaldskyldu. Til ber eisini at kæra til landsstýrisfólkið, um rættarstøðan skal nágreinast í fyrisitingarligari venju.

Landsfelag Pensjónista skilir væl og tekur undir við, at kringvarpsgjaldið verður prístaljavnað.

Hinvegin heldur Landsfelag Pensjónista ikki, at tað er at viðgera fólk eins, at gjaldið skal hækka soleiðis, at pensjónistar skulu rinda eina hækking uppá 26%, meðan tey undir pensjónsaldur skulu rinda eina hækking uppá 8,67%.

Verandi kringvarpsgjald hjá pensjónistum varð ásett í samband við lækkingina í grundupphæddini í fólkapensjónini í 2016, og átti tí ikki at hækkað so nógv, sum ætlanin er í hesum uppskotinum.

At áleggja pensjónistum eina hækking í kringsvarpsgjaldinum samstundis, sum smærri stovnar og virki fáa eina lækking hongur ikki saman.

Landsfelag Pensjónista mælir frá, at pensjónistar, sum verða knokkroyttir fíggjarliga frammanundan, skulu rinda eina lutfalsliga størri hækking í kringvarpsgjaldinum enn hini, og mæla samstundis til, at smærri stovnar og virki rinda tað, sum restar í fyri at fáa tað fíggjarliga uppá pláss, tá tað snýr seg um at prísjavna kringvarpsgjaldið.

Almanna- og mentamálaráðið metir ikki, at argumentið um at viðgera borgarar eins heldur í einum føri sum hesum, tá ið pensjónistar rinda 1/3 av tí, ið fólk undir fólkapensjónsaldur rinda í kringvarpsgjaldi. Tað er ymiskt, hvussu fólk eru fyri fíggjarliga í og undir pensjónsaldur. Upplýsast kann, at fíggjarligu umstøðurnar hjá fólkapensjónistum eru batnaðar munandi, síðani kringvarpsgjaldið varð ásett í 2016. Inntøka aftaná skatt og gjøld hjá einum fólkapensjónisti, sum bara hevur fólkapenjsón og Samhaldsfasta at liva av, er hækkað við knøppum 27 prosentum í tíðarskeiðinum 2016 til 2023. Í sama tíðarskeiði er ein arbeiðsmannaløn aftaná skatt og gjøld hækkað við umleið 13,5 prosentum. Í 2023 svarar kringvarpsgjaldið til umleið 1 % av eini arbeiðsmannaløn eftir skatt og gjøld (fulla tíð), og 0,4 % av tøku inntøkuni hjá einum fólkapensjónisti, sum ikki hevur aðra inntøku enn fólkapensjón og Samhaldsfasta. Við hesum uppskoti fer kringvarpsgjaldið í 2024 at svara til umleið 1,05% av eini arbeiðsmannaløn og 0,5 % av tøku inntøkuni hjá fólkapensjónisti.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Kringvarp Føroya fær ikki játtan til rakstur á fíggjarlógini, og lýsingarinntøkurnar fara í landskassan til tess at gera stovnin óheftan í mun til politisk og handilslig áhugamál. Tískil er

gjaldið ásett við serstakari lóg, kringvarpslógini. Fíggjarligu avleiðingarnar eru sambært tølum frá Kringvarpi Føroya, sum lýstar í fylgiskjali 2, at stovnurin í 2024 og 2025 fær ávikavist kr. 5.426.336 og kr. 6.730.317 meiri inn í kringvarpsgjaldi sammett við støðuna áðrenn broytingarnar. Fyri allar likamligar persónar verður gjaldið økt við kr. 13,00 um mánaðin.

Tó má helst eitt fyrivarni takast fyri útrokningunum hjá Kringvarpi Føroya av inntøkunum tað fyrsta árið, ið hongur saman við, nær lógin kemur í gildi, eins og rundingin av upphæddini kann ávirka inntøkugrundarlagið nakað.

Frá og við 2025 ein árlig javning fyri likamligar persónar sett í gildi áljóðandi 2% samanborið við árið fyri. Sigast skal, at tað hevur ikki verið møguligt at fáa tølini frá TAKS, ið siga, hvussu býtið hevur verið millum ymsu gjøldini fyri kommunalu stovnarnar, men upplýsast kann, at kommunalir stovnar í 2023 hava goldið tilsamans kr. 2.462.000. Býtið millum ymsu gjøldini hjá kommunalu stovnunum er tó ókent, og TAKS hevur ikki útgreinað tað nærri.

Fram til mánaðarskiftið eftir, at lógin kemur í gildi, fara likamligir persónar at rinda tað kringvarpsgjald, sum hevur verið galdandi áðrenn gildiskomu lógarinnar. Fyri at gera greitt, hvat av gjøldunum, ið prístalsjavningin skal fevna um, verður seinasta gjaldskylduga upphæddin árið fyri brúkt sum grundarlag undir javningini.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið fer at hava umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur, men fyri landið verður tað mest javningin, ið skal gerast á hvørjum ári, eins og eyðmerkjast má í skipanini hjá TAKS, hvør persónur er í fólkapensjónsaldri. Tað verður TAKS, ið framhaldandi fer at umsita kringvarpsgjaldið.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur jaligar fylgjur fyri tey virki, ið fáa ein lætta á kr. 500,00 um árið, t.e. virki, ið hava havt árligar lønarútgjaldingar millum kr. 100.000 og kr. 999.999,99.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið fevnir ikki um nakrar millumtjóða sáttmálar.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið fevnir ikki um nakrar tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Nei.

2.11. Skattir og avgjøld
Kringvarpsgjaldið og prístalsjavningin eru ásett í sjálvari lógini, og sostatt verður ikki mett, at talan er um nakað ósamsvar við delegatiónsforboðið ásett í § 41, stk. 1 í løgtingslóg um stýrisskipan Føroya, og so er hækkingin bert galdandi fram í tíð. Fyri virki og stovnar v.m., har gjaldið er knýtt at lønarútreiðslum árið fyri, er talan um eina lækking í kringvarpsgjaldinum, og tískil verður ikki mett, at tað er ein avbjóðing í mun til rættartrygd og stýrisskipan.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um gjald, tí kringvarpsgjaldið er at meta sum ein skattur, ið er tvungin, og har tað ikki er samsvar millum gjaldið hjá tí einstaka og tænastuna, sbr. t.d. Hægstarættardómin, U.1993.757H.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Ja, at rinda eitt hækkað kringvarpsgjald, sum frá og við 2025 verður prístalsjavnað á hvørjum ári. Smærri virki og stovnar fáa tó eitt lækkað kringvarpsgjald.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrisfólkið, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Nei.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Nei.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna

Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Ja	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1

Til nr. 1-3:
Samsvarandi broytingunum í tingskipanini verður orðið "landsstýrismaðurin" og ymiskar bendingar av tí broytt til: "landsstýrisfólkið" og ymiskar bendingar av tí.

Til nr. 4:
Gjaldskylduga upphæddin hjá fólki undir fólkapensjónsaldur hækkar úr kr. 150,00 um mánaðin og upp í kr. 163,00 um mánaðin.

Upphæddin hjá fólki í fólkapensjónsaldri sambært løgtingslóg um almannapensjónir o.a. hækkar úr kr. 50,00 um mánaðin og upp í kr. 63,00 um mánaðin.

Um hugt verður burtur frá broytingunum í gjaldskyldugu upphæddunum er § 7 annars í stóran mun óbroytt, og tí verður víst til viðmerkingarnar til ta lógargreinina í løgtingsmáli 26/2015.

Til nr. 5:
Fylgibroyting í tilvísingini.

Til nr. 6:
Fyri løgfrøðiligar persónar, har samlaða árliga lønarútgjaldið er millum kr. 500.000,00 og kr. 999.999,99, fer árliga kringvarpsgjaldið úr kr. 3.500,00 niður í kr. 3.000,00.

Til nr. 7:
Fyri løgfrøðiligar persónar, har samlaða árliga lønarútgjaldið er millum kr. 100.000,00 og kr. 499.999,99, fer árliga kringvarpsgjaldið úr kr. 2.000,00 niður í kr. 1.500,00.

Til nr. 8:
Upphæddirnar sambært stk. 1 og 2 verða frá og við 1. januar 2025 prístalsjavnaðar á hvørjum ári við tveimum prosentum í mun til árið fyri, t.e. at tann 1. januar 2025 verður gjaldið hjá likamligum persónum prístalsjavnað við tveimum prosentum í mun til seinastu gjaldskyldugu upphæddina í 2024, og tann 1. januar 2026 verður gjaldið prístalsjavnað í mun til seinastu gjaldskyldugu upphæddina í 2025, og soleiðis verður tað tann 1. januar á hvørjum ári. Tó

verður árliga gjaldsupphæddin rundað til nærmasta heila krónu tal. Sum dømi kann nevnast, at gjaldið fyri 2025 verður kr. 163 x 1,02 = kr. 166,26, so verður tað rundað til kr. 166,00. Í 2026 verður árliga gjaldið kr. 166 x 1,02 = 169,32, so verður tað rundað til kr. 169,00.

Til nr. 9-10:
Samsvarandi broytingunum í tingskipanini verður orðið "landsstýrismaðurin" og ymiskar bendingar av tí broytt til: "landsstýrisfólkið" og ymiskar bendingar av tí.

Til § 2
Áseting um gildiskomu, t.e. at broyting 1-3 og 9-10 koma í gildi beinanvegin. Viðv. broyting nr. 4-8, sbr. viðmerkingarnar til stk. 2 og 3 niðanfyri.

Stk. 2 merkir, at um lógin t.d. kemur í gildi 15. februar 2024, koma ásetingarnar í § 1, nr. 4-7 í gildi 1. mars 2024.

Í stk. 3 er ásett, at prístalsjavningin fyri likamligar persónar kemur í gildi 1. januar 2025, og tá verður tað seinasta gjaldskylduga upphæddin í 2024, ið fer at vera grundarlagið undir fyrstu javningini. Í 2026 verður tað seinasta gjaldskylduga upphæddin í 2025, ið verður grundarlagið undir javningini, og soleiðis verður prístalsjavnað á hvørjum ári. Tað verður TAKS, ið framvegis fer at umsita innkrevjingina og standa fyri prístalsjavningini.

Í stk. 4 er ásett, at um Kringvarp Føroya hevur eitt krav mótvegis borgara, áðrenn lógin kemur í gildi, eru krøvini fevnd av áður galdandi reglum.

Almanna- og mentamálaráðið, 8. feb. 2024.

Sirið Stenberg
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Kringvarpi Føroya
Fylgiskjal 3: Hoyringarsvar frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 4: Hoyringarsvar frá Knassum
Fylgiskjal 5: Hoyringarsvar frá TAKS
Fylgiskjal 6: Hoyringarsvar frá Tóra Restorff Jacobsen
Fylgiskjal 7: Hoyringarsvar frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 8: Hoyringarsvar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum
Fylgiskjal 9: Hoyringarsvar frá Landsfelag Pensjónista
Fylgiskjal 10: Hoyringarsvar frá Føroyskum Miðlafólkum
Fylgiskjal 11: Hoyringarsvar frá Starvsfelagnum (ummælisfreistin farin – ikki viðgjørt í viðmerkingunum)
Fylgiskjal 12: Hoyringarsvar frá Eldraráðnum í Tórshavnar kommunu (ummælisfreistin farin – ikki viðgjørt í viðmerkingunum)

Fylgiskjal 13: Hoyringarsvar frá Heilsumálaráðnum (ummælisfreist farin – ikki viðgjørt í viðmerkingunum)
Fylgiskjal 14: Hoyringarsvar frá Gunnari Skúvadal (ummælisfreist farin – ikki viðgjørt í viðmerkingunum)